

## Fangar til Europa

Tveir tunesar, sum hava verið í amerikonsku fangaleguni Guantanamo, eru komnir til Italia, og samstundis er ein maður úr Algeria komin úr Guantanamo til Fraklands. Amerikanskir hermenn tóku teir báðar tunesararnar í Afghanistan, og sambært italsku myndugleikunum hevði annar teirra tilknýti til ein yvirgangsbólk í Milano. Tann algerski maðurin, sum er komin til Frakland, bleiv tikin í Bosnia í 2001. Hann hevur verið í Guantanamo síðani, men er nú latin leysur, tí prógvini ímóti honum vóru ikki nóg góð, skrivar AFP.

# Góður november hjá kommununum

**Hagtølini hjá Taks staðfesta, at føroysku kommunurnar fingu meira í kassan í november í ár enn í fjør. Samlað fyri árið er talan tó framvegis um munandi minniinntøku**

BÚSKAPUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Samanlagt fingu føroysku kommunurnar 107,2 milliónir í kassan í november mánaði, og tað eru 3,1 millión meira enn í november í fjør.

Tíðaravmarkað frávik kunnu tó skeikla myndina fyri einstøku mánaðirnar, men ikki minst man tað vera hugaligt hjá klaksvíkingum at staðfesta, at meirinntøkan í mun til november mánað í fjør er yvir hálva millión krónur.

Samanlgt fyri fyrstu 11 mánaðirnar er talan tó framvegis u m minniinntøku hjá kommununum. Samanlagt er inntøkan fyrstu 11 mánaðirnar í ár 31,5 milliónir minni, enn hon var í fjør. Eitt frávik, sum svarar til 2,62%.



*Tað hendir ikki so ofta. Men í november kundu føroysku kommunurnar fegnast um, at skattainntøkurnar vóru hægri, enn tær vóru sama mánað í 2008*

# Klaksvíkar søga verður løgd fram hósdagin

**Hósdagin klokkan 19:30 verður framløga av øðrum bindi av Klaksvíkar søgu í býráðshøllini í Klaksvík**

BÓKAÚTGÁVA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað er Hans Andreas Sølvará, søgufrøðingur, sum hevur skrivað Klaksvíkar søgu, og hann fer at greiða frá um verkið.

Annað bind av Klaksvíkar søgu hevur undirheitið »Frá fríhandli til seinna heimskríggj 1856 til 1940«.

Til hátíðarløtuna fer sangbólkurin Suð at syngja, Gunvá við Keldu, borgarstjóri fer at halda røðu, og Elin Súsanna Jacobsen, lektari, Ph.D. fer at ummæla verkið, eins og høvundurin sjálvur fer at greiða frá arbeiðinum við Klaksvíkar søgu.

Høvi verður at ogna sær bókina og at fáa hana signeraða.




Bókin byrjar soleiðis: »Longu áðrenn fríhandilin varð settur í gildi í Føroyum í 1856, var ein úthandil hjá einahandlinum settur á stovn í Klaksvík. Tað var í 1838, at einahandilin setti ein av trimum úthandlum í Føroyum á stovn í Klaksvík. Vágin nordan fyri búplássið í Bø var, longu 200 ár áðrenn fríhandilin kom, ein víðakend keypmanshavn, har loynihandilsskip plagdu at leggja inn, og fólk úr øðrum bygdum og oyggjum komu til stadin at keypa og selja.«

